# Báta táttur

Eina veit eg rímuna,
inni hevur ligið leingi,
gjørd er um bóndan á Upplondum
og aðrar reystar dreingir.

*Væl økt fyri dag,*
*teir koma væl aftur av heiði.*

2. Eina veit eg rímuna,
inni hevur ligið enn,
gjørd er um bóndan á Upplondum
og aðrar reystar menn.

3. Gjørd er um bóndan á Upplondum,
hans líka tú ei kann finna,
so lystir honum at kapprógva,
sum leikar við streymin stinn.

4. Bóndin vaknar úr blundi upp,
hann telur sín dreym so brátt:
”Undarligt hevur mær fyri borist
í alla hesa nátt.

5. Meg droymdi, at mín stóra skúta,
hon mundi eftir havinum dreyga,
so droymdi meg, at Silvurnál,
hon skein sum gullið reyða.

6. Meg droymdi, at mín stóra skúta,
hon mól fyri mínum hondum,
so droymdi meg, at Silvurnál,
hon sigldi við silkjubondum.

7. Meg droymdi, at mín stóra skúta,
hon var við kempum full,
og so droymdi meg, at Silvurnál,
hon skein sum reyðagull.”

8. Árla var um morgunin,
sólin roðar í fjall,
bóndin vekir upp bátsmenn sínar,
hann fór í stóra kjall.

9. Ivri dreiv av bóndanum,
tað fall so væl í lag,
hann treiv um eitt skerpikrov,
hann rykti tað heilt avstað.

10. At taka eitt krov við heilum av stað,
slíkt er bóndasiður,
eitt stykki at skera í tríggjar partar:
mangur fyri hondini biður.

11. Fyrst vakti hann ta miklu kempu,
gull ber hon til merki,
Haraldsskjøldur av Miklagarði,
Brandur og Virgar sterki.

12. Bóndin biður sínar menn
ikki so leingi bíða:
”Eg havi droymt ein dreym í nátt,
eg vænti, vit fara at stríða.”

13. Bóndin biður sínar menn
gera so lítið pjak:
”Eg havi droymt ein dreym í nátt,
sum týðir eitt ódnartak.”

14. Kempurnar vóru til ferðar búgvnar
av so góðum treysti,
so tóku teir tann stóra Skrokk
og ryktu hann út úr neysti.

15. Tóku teir hann úr neystinum út
og dygst fyri bakkan niður.
Bóndin talar við bátsmenn sínar:
”Slíkt er kempusiður.”

16. Løgdu teir allir árar í hav
– nú man ríman falla –
út ígjøgnum tann stríða streym
og dygst undir Stóraskalla.

17. Svaraði kempan á stýriborðsbøgi
alt fyri uttan ekka:
”Vit skulu gera eitt kempuspæl,
áðrenn vit av skálum drekka.”

18. Seglini vóru av silkibondum,
togini av akurull,
tað situr ein kempa á bakborðsbøgi,
hon glógvar sum reyðagull.

19. ”So satt sum eg eri ein gullkempa
og siti her aftur á læri,
tit skulu falla for mínum hondum,
tí slektin er undan Skarði.”

20. Hondina legði hann út í gripið,
var sterkur sum Olgar Danski:
”Krígsblóð er í mínum kjøti,
teir kalla meg Gilpurin franski.”

21. ”Vilja tit nú vita har av,
hvussu hann eitur uppá danskt,
so hevur hann tað sama navn,
sum seyðasmæra uppá franskt.”

22. ”Eg eri sprottin av góðum fólki,
komin av prestastandi
gull beri eg á hvørjum hári,
høvuðskempan á Sandi.”

23. ”Eg eri sprottin av góðum fólki,
sum tit hava frætt,
eg eri slektaður úr Todnesi,
eri komin av prestaætt.”

24. Hevði eg verið á Orminum langa,
tá ið Norskir og Eirikur stríddu,
eg skuldi ikki verið sum Jómsvíkingar,
tá ið teir av landinum flýddu.

25. Hevði eg verið á Orminum langa,
tá ið Eirikur legði at borði,
hevði eg verið í lyftingi,
tá skuldi verið øðrvísi vorðið.

26. Hevði eg verið í Runtsival,
sum Rólant, keisarans frændi,
tá skuldu tit sæð eina avrekskempu
vera komna av Føroya landi.

27. Knappar undir knøunum
og reyðar rósur á læri,
tað er siður á Sandi,
komin er undan Skarði.”

28. Tað situr ein kempa frammi í rong,
hann heldur sær at gaman:
”Tað síggi eg á ferðini,
at bátarnir koma saman.”

29. Tað var bóndin á Upplondum,
hann aftur um seg lítur:
Takið mær hesa Silvurnál,
ið her fyri borði flýtur.”

30. Bóndin biður sínar menn
leggja árar í hav
og taka so Sperðilin nýgjørdan
og støkka hann tvørtur av.

31. Allir løgdu árar í hav,
so vørrur frá grunni bullu,
Skrokkur rendi eina langa leið,
teir róptu hann kempurullu.

32. Tað var henda Silvurnál,
hon heim ígjøgnum Íðuna kemur,
veikin svør um sína sál,
at hann ikki árina nemur.

33. Allir settu føtur í bekk,
tá mundi Skrokkur ganga
heim ígjøgnum tann breiða Barm
og dygst fyri Boðatanga.

34. Tað situr ein kempa á stýriborðs bøgi,
herðarnar sum á skarvi,
ongum líkari enn tramanum,
og eyguni sum í tarvi.

35. Tað sita tvær kempur á toftubekki,
tær mæla fyri sínum munni,
dundrini hoyrdust í hamrar upp,
tá ið vørrir veltust frá grunni.

36. Dundrini hoyrdust í hamrar upp,
tá ið vørrir veltust frá grunni,
bóndin talar til bátsmenn sínar:
”Nú hava vit leikin vunnið.”

37. Tann fyrsti bátur, at landi legði,
tað var ein reiðilig skúta.
”Eg gevi honum eitt vakurt navn,
eg kalli hann Mariusúta.”

38. Tann onnur skúta, at landi legði,
í Seyrvágum var hon smíðað.
”Eg gevi henni eitt vakurt navn,
eg kalli hana Royndina fríða.”

39. Tann triði bátur, at landi legði,
hann hevði so vakurt mál.
”Eg gevi honum eitt vakurt navn,
eg kalli hann Silvurnál.”

40. Tann fjórði bátur, at landi legði,
teir kallaðu hann Askaremma,
eingin legði mið av honum,
ei heldur so fagra stemmu.

41. Tann fimti bátur, at landi legði,
hann var undan Skarði,
høvdu tit honum í Flógvanum møtt,
tit komu í verri vari.

42. Tann sætti bátur, at landi legði,
hann mundi so lítið duga:
”Enn liggur Hanus á Skarvanesi
eysturi í Barmi og tugar.”

43. Tóku teir bátin um bakkan upp,
hann hevði stýrið á Stebba,
bóndin tapti á Kunoyar galvi,
og nevið var sum í Frebba.

44. Settu teir bátin í neytið inn,
alt fyri uttan vanda:
”Hvat skulu slíkir pumpuringar
í roysnisverkum standa?”

45. Settu teir bátin í neystið inn,
alt fyri uttan sorg,
so glaður snúðist Ólavur bóndi
aftur í sína borg.

46. Ólav bónda á Upplondum,
hann vilja vit ikki happa.
Sperðilin hanna á sundi sprongdi
við sínar forgyltu knappar.

47. Skipini sigldu fyri eystan
bæði við ertur og grýn,
róðurlykkjan av korkajørnum,
– nú endar ríman mín.

Báta táttur stendur í Táttabók I, sum Jóannes Patursson gav út í 1934, og haðani er hann skrivaður av her. Í bók síni ”Søga og skemt av Sandi” skrivar Ólavur Clementsen um Heindrik á Heyggi (1787-1861), sum hevur yrkt táttin. Heindrikkur var ógvuliga hittinorðaður og dugdi væl at yrkja.

Um táttin stendur at lesa hjá Ólavi:
”Hesin táttur er um eina kapprógving uttan av Havi, har hann avmyndar bátar, menn og hvussu leikur fer. Bóndin á Upplondum er Óli í Horni, ið var formaður á áttamannafarinum ”Skrokki”. ”Silvurnálin” er traðabáturin, Haraldsskjøldur av Miklagarði man vera Haraldur á Skeljalaðnum, Kempan á stýriborðsbøgi er Jóannes í Vørðutoft, bróðursonur Heindrikk, Askaremma var báturin hjá Óla í Mittúni. Óli var av bestu miðamonnum og hevði vakra og sterka rødd. Tátturin man vera yrktur um ár 1840.” jd.